# ÁRSFRÁGREIÐING 2022

www.als.fo



ALS

# INNIHALD

**ÁTEKNINGAR**

Leiðsluátekning 4

Grannskoðanarátekning frá óheftum grannskoðara 5

**LEIÐSLUFRÁGREIÐING**

Upplýsingar um grunnin 8

Høvuðs- og lyklatøl 9

Leiðslufrágreiðing 10

**ÁRSROKNSKAPUR**

Nýttur roknskaparháttur 44

Rakstrarroknskapur 1. januar - 31. desember 47

Fíggjarstøða 1. januar - 31. desember 48

Peningastreymsuppgerð 1. januar - 31. desember 50

Notur til ársfrásøgnina 52

**ALS - Ársfrágreiðing 2022**

**Myndir**: ALS, Sansir.

**Sniðgeving og uppseting**: Sansir
**Prent**: Føroyaprent

# Leiðsluátekning

Stýrið og stjórnin hava í dag viðgjørt og góðkent ársfrásøgnina fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2022 fyri ALS.

Ársfrásøgnin er greidd úr hondum í samsvari við ársroknskaparlógina.

Vit meta, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðu grunsins tann 31. desember 2022 umframt av grunsins virksemi og peningastreymi grunsins fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2022.

Vit meta, at leiðslufrágreiðingin inniheldur eina rættvísandi frágreiðing um tey viðurskifti, sum frágreiðingin umrøður.

Ársfrásøgnin verður løgd fram til góðkenningar fundsins.

Tórshavn, tann 25. mai 2023

**Stjórn**

Magni á Deild Olsen
stjóri

Eyðfinnur Jacobsen
formaður

Magnus Pauli Glerfoss

Georg F. Hansen

Stefan í Skorini

Anita Fuglø

Niels Winther

Óluva í Gong



# Grannskoðanarátekning frá óheftum grannskoðara

## Til leiðsluna í Arbeiðsloysisskipanini

**Grannskoðanarátekning á ársroknskapin**

### Niðurstøða

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá ALS fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2022 við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum. Ársroknskapurin er gjørdur eftir ársroknskaparlógini við teimum tillagingum, sum eru lýstar undir nýttum roknskaparhátti.

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av grunsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu tann 31. desember og úrslitinum av virkseminum hjá ALS í roknskaparárinum 1. januar - 31. desember 2022 samsvarandi ársroknskaparlógini við teimum tillagingum, sum eru lýstar undir nýttum roknskaparhátti.

### Grundarlag fyri niðurstøðuni

Vit hava grannskoðað samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og eftir øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum. Okkara ábyrgd sambært hesum standardum og krøvum er nærri lýst í grannskoðanarátekningini í pettinum "Ábyrgd grannskoðarans av grannskoðanini av ársroknskapinum". Vit eru óheft av grunninum samsvarandi altjóða etisku reglunum fyri grannskoðarar (etisku reglurnar hjá IESBA) og øðrum ásetingum, ið eru galdandi í Føroyum, eins og vit hava lokið onnur etisk krøv, sum vit hava sambært hesum reglum og krøvum. Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kunnu vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

### Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við ársroknskaparlógina. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av innanhýsis eftirlitinum, ið leiðslan metir skal til fyri at gera ársroknskapin uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

Tá ið ársroknskapurin verður gjørdur, hevur leiðslan ábyrgdina av at meta um, hvørt grunnurin megnar at halda áfram við rakstrinum, og har tað er viðkomandi at upplýsa um viðurskifti viðvíkjandi framhaldandi rakstri og at gera ein ársroknskap eftir roknskaparásetingunum um framhaldandi rakstur, uttan so at leiðslan hevur ætlanir um at avtaka grunnin, steðga rakstrinum ella um leiðslan í roynd og veru ikki hevur aðrar møguleikar.

# Grannskoðanarátekning frá óheftum grannskoðara

**Ábyrgd grannskoðarans av grannskoðanini av ársroknskapinum**
Endamál okkara er at fáa eina grundaða vissu fyri, at ársroknskapurin sum heild er uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, og at gera eina grannskoðanarátekning við eini niðurstøðu. Grundað vissa er vissa á høgum stigi, men er tó ikki ein trygd fyri, at grannskoðan framd samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og øðrum áseting-um, sum eru galdandi í Føroyum, altíð kann avdúka týðandi skeivleikar, um slíkir eru. Skeivleikar kunnu koma fyri orsakað sviki ella mistøkum og mugu metast at verða týðandi, um tað er sannlíkt, at teir hvør sær ella saman kunnu metast at hava ávirkan á fíggjarligu avgerðirnar, ið roknskaparbrúkararnir taka við støði í ársroknskapinum.

Tá ið vit grannskoða samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum í føroysku grann-skoðaralógini, gera vit yrkisligar metingar og varðveita professionella ivasemið undir grannskoðanini.

Harumframt:

- Eyðmerkja og meta vit um váðan fyri týðandi skeivleik-um í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, leggja til rættis og grannskoða samsvarandi hesum váða og fáa til vega grannskoðanarprógv, ið eru nóg góð og egnað sum grundarlag undir okkara niðurstøðu. Váðin fyri, at vit ikki avdúka týðandi feilir orsakað av sviki, er størri enn váðin fyri, at feilir orsakað av mistøkum ikki verða avdúkaðir, av tí at svik kann umfata samansvørjing, skjalafalsan, tilætlaðari dyljan, villleiðing ella at innanhýsis eftirlit verða skúgvað til viks.

- Eyðmerkja og meta vit um váðan fyri týðandi skeivleik-um í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, leggja til rættis og grannskoða samsvarandi hesum váða og fáa til vega grannskoðanarprógv, ið eru nóg góð og egnað sum grundarlag undir okkara niðurstøðu. Váðin fyri, at vit ikki avdúka týðandi feilir orsakað av sviki, er størri enn váðin fyri, at feilir orsakað av mistøkum ikki verða avdúkaðir, av tí at svik kann umfata samansvørjing, skjalafalsan, tilætlaðari dyljan, villleiðing ella at innanhýsis eftirlit verða skúgvað til viks.

- Fáa vit fatan av tí innanhýsis eftirliti, ið er viðkomandi fyri grannskoðanina, soleiðis at vit kunnu leggja grannskoð-anina til rættis á nøktandi hátt eftir umstøðunum, men ikki fyri at gera eina niðurstøðu um, hvussu virkið innanhýsis eftirlitið er.

- Taka vit støðu til, um tann av leiðsluni nýtti roknskapar-háttur er hóskandi, eins og vit meta um, hvørt rokn-skaparligu metingarnar og tilhoyrandi upplýsingar frá leiðsluni eru rímiligar.

- Taka vit støðu til, um tað er hóskandi, at leiðslan hevur valt at gera ársroknskapin grundað á roknskaparháttin um framhaldandi rakstur, og um tað, við støði í teimum grannskoðanarprógvum, ið eru fingin til vega, er týðandi óvissa ella viðurskifti, ið kunnu elva til týðandi óvissu um, hvørt grunnurin megnar at halda áfram. Er niður-støðan, at tað er týðandi óvissa, skulu vit gera vart við hetta í grannskoðanarátekningini við at vísa til upp-lýsingar hesum viðvíkjandi í ársroknskapinum ella, um hesar upplýsingar ikki eru nøktandi, tillaga okkara niðurstøðu. Okkara niðurstøður eru grundaðar á tey grannskoðanarprógv, ið eru fingin til vega fram til dagin, tá ið okkara grannskoðanarátekning verður undir-skrivað. Hendingar í framtíðini ella viðurskifti kunnu tó elva til, at grunnurin ikki er førur fyri at halda áfram við rakstrinum.

- Taka vit støðu til samlaðu framløguna, bygnaðin og innihaldið í ársroknskapinum, íroknað upplýsingarnar í notunum umframt um ársroknskapurin vísir trans-aktiónir, sum liggja undir, og hendingar á ein slíkan hátt, at tað gevur eina rættvísandi mynd.



# Grannskoðanarátekning frá óheftum grannskoðara

Vit samskifta við leiðsluna um millum annað vavið á ætlaðu grannskoðanini og nær vit vænta at grannskoða. Harumframt samskifta vit um týðandi eygleiðingar í sambandi við grannskoðanina, so sum týðandi manglar í innanhýsis eftirlitinum, ið vit eru komin fram á í sambandi við grannskoðanina.

**Ummæli av leiðslufrágreiðingini**
Leiðslan hevur ábyrgdina av leiðslufrágreiðingini.

Okkara niðurstøða um ársroknskapin fevnir ikki um leiðslufrágreiðingina, og vit geva ikki nakra váttan við vissu um leiðslufrágreiðingina.

Tað er okkara ábyrgd, í sambandi við grannskoðanina av ársroknskapinum, at lesa leiðslufrágreiðingina og í hesum sambandi meta um, hvørt samanhangur er millum leiðslufrágreiðingina og ársroknskapin, ella um hon er í mótsøgn við ta vitan, ið vit hava fingið undir grannskoðan-ini, ella á annan hátt er tengd at týðandi skeivleikum.

Okkara ábyrgd er harumframt at hugsa um hvørt leiðslu-frágreiðingin hevur kravdu upplýsingarnar samsvarandi ársroknskaparlógini.

Grundað á gjørda arbeiðið er tað okkara fatan, at leiðslu-frágreiðingin samsvarar við ársroknskapin, og at hon er gjørd samsvarandi krøvunum í ársroknskaparlógini. Vit eru ikki vorðin varug við týðandi feilir í leiðslufrágreiðing-ini.

Tórshavn, 25. mai 2023

SPEKT løggildir grannskoðarar Sp/f

Jóhannes Færø
statsaut. revisor

# Upplýsingar um grunnin

## GRUNNURIN

**ALS**
Tinghúsvegur 14
100 Tórshavn
Telefon: 349550
Heimasíða: www.als.fo

Roknskaparár: 1. januar - 31. desember

## STÝRIÐ

Eyðfinnur Jacobsen, formaður
Anita Fuglø
Georg F. Hansen
Magnus Pauli Glerfoss
Niels Winther
Óluva í Gong
Stefan í Skorini

## STJÓRN

Magni á Deild Olsen, stjóri

## GRANNSKOÐAN

SPEKT løggildir grannskoðarar Sp/f
Staravegur 17
100 Tórshavn



# Høvuðs- og lyklatøl

Gongdin hjá grunninum seinastu 5 árini kann lýsast við hesum høvuðs- og lyklatølum:

| | **2022** tkr. | **2021** tkr. | **2020** tkr. | **2019** tkr. | **2018** tkr. |
|---|---|---|---|---|---|
| **Høvuðstøl** | | | | | |
| Inngjøld | 221.310 | 208.252 | 253.155 | 245.151 | 231.859 |
| Útgjøld | 62.816 | 76.899 | 206.017 | 51.244 | 71.280 |
| Bruttoúrslit | 155.329 | 127.782 | 42.800 | 189.510 | 155.577 |
| Úrslit áðrenn fíggjarpostar | 138.881 | 111.807 | 25.969 | 174.940 | 140.553 |
| Úrslit frá fíggjarpostum | -113.071 | 23.162 | 12.105 | 26.065 | -8.324 |
| **Ársúrslit** | **24.890** | **134.107** | **37.084** | **199.694** | **131.277** |
| | | | | | |
| **Fíggjarstøða** | | | | | |
| Fíggjarstøðujavni | 1.116.050 | 1.089.912 | 959.008 | 916.652 | 717.169 |
| Íløgur í materiella støðisogn | 1.218 | - | -75 | -1.164 | -1.434 |
| **Eginogn** | **1.107.049** | **1.082.159** | **948.052** | **910.968** | **711.274** |
| | | | | | |
| **Peningastreymur frá:** | | | | | |
| - rakstrarvirksemi | 26.211 | 133.327 | 42.080 | 198.972 | 130.722 |
| Ársverk | 27 | 26 | 27 | 29 | 33 |
| | | | | | |
| **Lyklatøl** | | | | | |
| Høvuðsavkast | 12,4% | 10,3% | 2,8% | 21,4% | 21,6% |
| Tryggleikastig | 99,2% | 99,3% | 98,9% | 99,4% | 99,2% |
| Eginpeningsavkast | 2,3% | 13,2% | 4,0% | 24,6% | 20,3% |

# LEIÐSLU-FRÁGREIÐING **2022**

Sera lága arbeiðsloysið, sum hevur verið seinastu nógvu árini, stóð við í 2022. Í fyrsta ársfjórðingi var arbeiðsloysið 1% og frá juni mánaði og fram til november mánað var arbeiðsloysið 0,7%, og kvinkaði so upp á 0,8% í desember mánaði.

Í miðal fyri árið var arbeiðsloysið 0,8%, sum er tað lægsta, arbeiðsloysið nakrantíð hevur verið í Føroyum.

Arbeiðsloysið í Føroyum var eisini tað lægsta samanborið við londini í ES, har Kekkia var landið við lægsta arbeiðsloysinum í desember 2022. Arbeiðsloysið í Kekkia var 2,2%, meðan tað í Føroyum var 0,8%.

Nógva virksemið, sum hevur verið í Føroyum í nógv ár, helt fram í 2022, og tørvurin á arbeiðsmegi var framvegis stórur.

## Fast Track-skipanin

Í sambandi við søguliga lága arbeiðsloysið í Føroyum og stóra tørvin á skikkaðari arbeiðsmegi gjørdu landsstýrismaðurin í umhvørvis- og vinnumálum og danski ráðharrin í útlendinga- og integratiónsmálum tann 4. november 2021 avtalu um eina Fast Track-skipan fyri útlendska arbeiðsmegi. Skipanin styttir viðgerðartíðina og gevur øllum vinnugeirum í Føroyum lættari atgongd at fáa arbeiðsmegi úr triðjalondum, t.e. úr londum uttan fyri ES og Norðurlond. Skipanin kom í gildi tann 18. november 2021 og er í gildi, so leingi arbeiðsloysið er niðan fyri 3,5%. Ein tann største avbjóðingin og forðingin fyri virkseminum hjá føroyskum arbeiðsgevarum er at útvega skikkaða arbeiðsmegi, og Fast Track-skipanin er tí komin væl við hjá teimum, men skilst loysir hon bert ein part av avbjóðingunum hjá arbeiðsgevarunum at útvega skikkað starvsfólk.

Arbeiðsloysið við árslok 2022

**0,8%**

2021: 0,9%

Tað eru 112 føroyskir arbeiðsgevarar í øllum vinnum, sum eru góðkendir at fáa útlendingar til Føroyar at arbeiða eftir Fast Track-skipanini.

Nógvu útlendingarnir, sum koma til Føroyar at arbeiða, síggjast eisini aftur hjá Arbeiðsloysisskipanini. Tað er so, at tá útlendingar, sum koma til Føroyar at arbeiða við tíðaravmarkaðum arbeiðs- og uppihaldsloyvi, verða sagdir úr starvi, skulu arbeiðsgevari og starvsfólk alt fyri eitt boða SIRI í Danmark frá, at broytingar hava verið í setanarviðurskiftunum hjá viðkomandi. Tá so er, kann útlendingurin vera í Føroyum, til uppihaldsloyvið endar, men viðkomandi kann ikki fara í annað starv, fyrr enn loyvi er fingið til tað frá myndugleikunum.

Hesir útlendingar kunnu koma illa fyri. Teir hava onga lønarinntøku, og teir lúka ikki treytirnar at koma í ALS og hava tí ikki rætt til arbeiðsloysisstuðul.

ALS er ikki avvarðandi myndugleiki, men nógvir av útlendingunum venda sær til ALS at leita sær hjálp, og vit hjálpa teimum kortini við at vísa á, hvagar teir kunnu venda sær at fáa hjálp og vegleiðing.

Tað er sannføringin hjá ALS, at útlendingar, sum koma hendan vegin at arbeiða, eiga at verða vístir hóskandi virðing og fáa ta hjálp, teimum tørvar, tá tørvur ikki longur er á teimum á føroyska arbeiðsmarknaðinum.

## Fiskavirkisskipanin veksur

Við árslok 2022 vóru 1.217 fólk knýtt at fiskavirkisskipanini og høvdu harvið rætt til arbeiðsloysisstuðul úr fiskavirkisskipanini, um einki arbeiði var á fiskavirkinum, har tey vóru í starvi. Tað er mesta talið av fólki, sum hevur verið knýtt at fiskavirkisskipanini, síðani Føroya Fiskavirking fór av knóranum í desember mánaði í 2010. Tá flest fólk í hesi øldini vóru í fiskavirkisskipanini, vóru tað 1.600 fólk, sum vóru knýtt at fiskavirkisskipanini. Tað var fyri júst 20 árum síðani í apríl mánaði í 2003.

Útgjøldini úr fiskavirkisskipanini vóru óvanliga høg í 2022. Samanlagt vórðu oman fyri 27,6 mió. krónur rindaðar í arbeiðsloysisstuðli um fiskavirkisskipanina í 2022. Hetta er nakað meiri enn í 2021, tá 26,1 mió. krónur vórðu goldnar út, og tað mesta, sum er goldið í arbeiðsloysisstuðli um fiskavirkisskipanina síðani 2010, tá 28,5 mió. krónur vórðu goldnar.

Í 2022 var arbeiðsloysisstuðul goldin fyri samanlagt 257.720 tímar. Tað merkir, at einki arbeiði var til á leið 150 ársverk í fiskavirkisvinnuni á landi í 2022. Tímatalið er nakað lægri enn árið fyri, men hóast tað var samlaða útgjaldið kortini nakað hægri.

Tað ber til at siga, at fiskavirkisskipanin er viðvirkandi til, fiskavirkini fasthalda tilknýtið til starvsfólkini, hóast einki arbeiði er til teirra partar av tíðini.

Tað er óheppið og ein andsøgn, at arbeiðsmegi á hendan hátt verður hildin í eini arbeiðsloysisskipan og eini vinnu við ongum arbeiði, meðan arbeiðsloysið í Føroyum er metlágt, og stórur tørvur er á arbeiðsmegi í øðrum vinnum.

Eins og í vanligu arbeiðsloysisskipanini er tað krav, at persónar, ið eru í fiskavirkisskipanini, skulu vera tøkir fyri at verða mettir sum arbeiðsleysir og hava rætt til arbeiðsloysisstuðul úr fiskavirkisskipanini. Hóast tað, so ber illa til hjá ALS at bjóða teimum annað leyst starv, tí boðað verður frá afturvirkandi, um persónur hevur verið arbeiðsleysur eitt tíðarskeið.

Yvirskipað hevði tað óivað verið betur, um fólk, sum einki arbeiði hava á fiskavirki, heldur vóru til arbeiðis hjá øðrum arbeiðsgevara, sum veruliga tørvar arbeiðsmegina, heldur enn at ganga fyri einki á fiskavirki har einki arbeiði er.





## Skipanin er væl fyri fíggjarliga

Arbeiðsloysisskipanin er væl fyri fíggjarliga, og stýrið fyri ALS hevur mælt landsstýriskvinnuni í umhvørvismálum at lækka ALS-gjaldið úr 1,0% niður í 0,8%. Tað hevði havt við sær, at samlaðu árligu inngjøldini høvdu verið á leið 40-45 mió. krónur lægri, enn tey høvdu verið, hevði ALS-gjaldið verið óbroytt.

Fyrsti ársfjórðingur av 2023 er farin um bak, men enn er ALS-gjaldið ikki lækkað. Tí fara samlaðu inngjøldini í 2023 ikki at minka so nógv, sum roknað var við.

Góða fíggjarførið ger, at Arbeiðsloysisskipanin megnar at lofta fíggjarligu avbjóðingunum av einum hægri arbeiðsloysi í nógv ár.

Við verandi eginogn megnar skipanin at standa ímóti einum arbeiðsloysi á 8% í eini fimm til seks ár og einum arbeiðsloysi á 10% í eini trý til fýra samanhangandi ár.

Seinast, arbeiðsloysið var 8%, var í 1997 – fyri 26 árum síðani.

Stýrið fyri ALS hevur sett sum mál, at Arbeiðsloysisskipanin skal javnviga fíggjarliga, tá arbeiðsloysið er millum 4,25% og 4,50%. Hetta markið hevur støði í søguliga arbeiðsloysinum og merkir, at tá arbeiðsloysið er niðan fyri 4,25% til 4,5%, skal skipanin hava avlop, meðan hon kann hava hall, tá arbeiðsloysið fer upp um 4,5%.

Brake-even arbeiðsloysið – tað er tá arbeiðsloysið verður so høgt, at Arbeiðsloysisskipanin hevur hall - er í løtuni á leið 4%, og harvið nakað lægri enn tað, stýrið hevur sett sum mál.

Miðalarbeiðsloysið tey 25 árini síðani 1997 hevur verið 3,5%, og seinastu tíggju árini hevur tað verið 2,6%, so markið fyri brake-even arbeiðsloysið verður fyribils mett at vera nøktandi.

Neyvt hvussu langtíðarhaldførið er, veldst um orsøkirnar til møguligt hækkandi arbeiðsloysi, og hvussu møguligar broytingar ávirka fíggjarmarknaðirnar og harvið fíggjarinntøkurnar hjá ALS.

# Fólkatalið veksur

Fólkatalið í Føroyum hevur verið vaksandi í nógv ár, og ongantíð áður hava búð so nógv fólk í Føroyum sum nú. Við ársbyrjan 2022 búðu 53.559 fólk í Føroyum, og við árslok var talið komið upp á 54.181. Ein vøkstur á 622 fólk.

Tey fimm árini frá 1. januar 2017 til 1. januar 2022 vaks fólkatalið við 3.843 fólkum. Av teimum var á leið helmingurin føddur í Føroyum, meðan hin helmingurin var borin í heim uttanlands. Ein triðingur av teimum, sum var føddur uttanlands, vóru fødd í Danmark.

Tað er gleðiligt, at fleiri fólk flyta til landið, tí arbeiði er til allar hendur, og tørvur er á arbeiðsmegini.

Sum fólkatalið veksur, veksur eisini arbeiðsfjøldin, og fleiri fólk eru til arbeiðis, og lønarútgjaldingarnar vaksa.

Áhaldandi jaliga gongdin við nógvum virksemi og lágum arbeiðsloysi sæst aftur í fíggjarviðurskiftunum hjá Arbeiðsloysisskipanini, og fíggjarliga royndist eisini 2022 toluliga væl.

ALS-gjaldið var óbroytt 1,0% í 2022, men samlaðu inngjøldini hækkaðu kortini við 13,1 mió. krónum, og samlaðu inngjøldini vóru 221,3 mió. krónur. Samlaðu útgjøldini minkaðu við 14,0 mió. krónum, og úrslitið fyri fíggjarpostar var eitt avlop á 138,9 mió. krónur. Til samanberingar var úrslitið fyri fíggjarpostar eitt avlop á 111,8 mió. krónur í 2021.

Nógv órógv var á altjóða fíggjarmarknaðunum í 2022, renturnar hækkaðu, og prísirnir á bæði partabrøvum og lánsbrøvum lækkaðu. Tá árið var úti, hevði ALS ein miss á 113,1 mió. krónur av fíggjarognunum. Tað svarar til minus 10,4%.

Gjaldførið hevur tó verið sera gott, og tað hevur tí ikki verið neyðugt at selja burtur av virðisbrævatyssinum.

Ársúrslitið varð eitt avlop á 24,9 mió. krónur. Høvdu fíggjarognirnar kasta á leið tað av sær, sum tær vanliga gera, so hevði ársúrslitið verið eitt avlop á umleið 160 mió. krónur.

Við úrslitinum fyri 2022 kom eginognin við árslok upp á 1.107 mió. krónur, sum er tað mesta nakrantíð, og við hesi eginognini megnar ALS at standa ímóti einum arbeiðsloysi á 8% í á leið 5 til 6 ár, áðrenn skipanin verður insolvent.

Stýrið og stjórn fegnast um, at úrslitið í 2022, hóast stórar missir av fíggjarognunum, gjørdist so mikið gott.

# Arbeiðsloysið enn lágt

Arbeiðsloysið er støðugt lækkað, síðani tað var í hæddini fyri stívliga 12 árum síðani, tá Føroya Fiskavirking fór av knóranum í desember mánaði í 2010.

Tá var arbeiðsloysið oman fyri 7%, og við árslok í 2022 var arbeiðsloysið komið niður á 0,8%. Hetta er lægsta arbeiðsloysið, sum nakrantíð er skrásett í Føroyum yvirhøvur.

Í desember 2022 vóru 291 fólk rakt av arbeiðsloysi.

Í januar mánaði í 2023 kvinkaði arbeiðsloysið upp á 0,9%, men hevur síðani verið 0,8%.

Tað vóru í miðal 169 fólk, sum fingu arbeiðsloysisstuðul hvørja ferð, arbeiðsloysisstuðul varð goldin út í 2022. Í 2021 vóru tað í miðal 267 fólk, sum fingu arbeiðsloysisstuðul hvørt útgjaldsskeið.

Afturat hesum 169 fólkunum koma tey, sum fingu forsorg vegna arbeiðsloysi frá Almannaverkinum. Tey eru eisini partur av arbeiðsloysinum í Føroyum og eru tald við í almennu arbeiðsloysistølunum hjá Hagstovuni.
**Sí mynd 01.**

**Mynd 01** / Arbeiðsleys í % av arbeiðsfjøldini - ársmiðal




**Mynd 02** / Arbeiðsloysið 2021 - 2023




# Gongdin í 2021-2023

So við og við sum arbeiðsloysið minkar, gerast sveiggini í arbeiðsloysinum gjøgnum árið eisini minni. Í 2021 sveiggjaði arbeiðsloysið millum 1,6% við ársbyrjan niður í 0,8% við árslok. Í 2022 var arbeiðsloysið 1,0% við ársbyrjan, og lækkaði niður í 0,8% við árslok.

Í fyrsta ársfjórðingi av 2023 er tað lækkað úr 0,9% í januar niður í 0,8% í mars. **Sí mynd 02.**

*... við hesi eginognini [á 1.107 mió. krónur] megnar ALS at standa ímóti einum arbeiðsloysi á 8% í á leið 5 til 6 ár, áðrenn skipanin verður insolvent.*




## Áhaldandi meldur

Hóast arbeiðsloysið hevur verið metlágt í longri tíð, so er kortini altíð ein meldur av fólki á og av arbeiðsmarknaðinum. Hesin meldurin, sum er eitt slag av natúrligum arbeiðsloysi, er yvirhøvur fólk, sum fara úr einum starvi og eru á veg í annað starv.

Summi missa arbeiðið lutfalsliga stutt fyri, tey røkka pensiónsaldur og vera í Arbeiðsloysisskipanini, til tey eru fylt 67 ár. Í 2022 vóru tey 10 í tali.

Onnur eru so longi arbeiðsleys, at tey røkka teimum 648 døgunum, sum er mesta talið av døgum, tey kunnu vera í skipanini. Tey vóru seks í tali í 2022, sum er nakað hægri enn undanfarnu tvey árini, tá tað bert var ein persónur hvørt árið, sum datt úr skipanini vegna fult dagatal.

Meginparturin av fólkunum, sum missa arbeiði og koma í Arbeiðsloysisskipanina, eru farin til arbeiðis aftur áðrenn á leið tríggir mánaðir eru farnir. Men tað eru altíð nøkur, sum eru longri arbeiðsleys, og nøkur, sum gerast langtíðararbeiðsleys. Tað merkir, at tey hava verið burtur frá arbeiðsmarknaðinum í meiri enn eitt ár.

Í 2022 komu tað samanlagt 541 nýggj fólk í ALS, meðan 550 fólk fóru úr skipanini.

Av hesum eru nøkur, sum hava verið arbeiðsleys í fleiri umførum. **Sí mynd 03.**

**Mynd 03** / Tal av persónum komin í og farin úr Arbeiðsloysisskipanini






## Lægsta arbeiðsloysið í Evropa

Seinastu átta árini hevur arbeiðsloysið í Føroyum verið tað lægsta yvirhøvur samanborið við onnur lond í Evropa.

Í 2022 minkaði arbeiðsloysið í 23 av teimum 32 londunum í ES, meðan tað kvinkaði eitt sindur uppeftir ella var óbroytt í hinum níggju londunum.

Undir einum minkaði arbeiðsloysið í ES úr 6,4% við árslok í 2021 niður í 6,1% við árslok 2022. Til samanberingar minkaði arbeiðsloysið í Føroyum úr 1,0% niður í 0,8% sama tíðarskeið.

Eins og undanfarnu árini var Kekkia tað landið í Evropa, har arbeiðsloysið var næstlægst. Har var arbeiðsloysið tó næstan tríggjar ferðir so stórt, sum tað var í Føroyum, 2,2% í Kekkia í mun til 0,8% í Føroyum.

Noreg var aftur tað norðurlandið, har arbeiðsloysið var lægst næst eftir Føroyum. Við árslok í 2022 var arbeiðsloysið í Noreg 3,4%, sum var nakað hægri enn eitt ár frammanundan. **Sí mynd 04.**




**Mynd 04** / Arbeiðsloysið í londunum í Evropa í desember mánaði 2022

## Fleiri løntakarar

Gongdin við minkandi arbeiðsloysi sæst aftur í talinum av løntakarum, sum hevur verið støðugt vaksandi seinastu ellivu árini.

Ikki óvæntað er eitt ávíst samsveiggj millum arbeiðsloysið og talið av løntakarum soleiðis, at tá talið av løntakarum veksur, so minkar arbeiðsloysið.

Við árslok í 2022 vóru tað 28.322 løntakarar í Føroyum. Hetta eru 254 løntakarar fleiri enn eitt ár frammanundan, og er hetta tað mesta, sum yvirhøvur er skrásett í Føroyum nakrantíð.

Tað er eisini eitt øvugt samsveiggj millum arbeiðsloysið og nettoflyting soleiðis, at tá arbeiðsloysið minkar, vísir tað seg, at nettoflytingin til Føroyar veksur – og øvugt. **Sí mynd 05 og 06**

## Lønargjaldingarnar hækka

Trettanda árið á rað hækkaðu samlaðu lønargjaldingarnar í 2022. Tá árið var úti, vóru 11,2 mia. krónur goldnar út í lønum.

Samanborið við árið frammanundan var talan um ein vøkstur á 544 mió. krónur, sum svaraði til 5,1%.

Vøksturin tykist halda fram í 2023, tí fyrstu tveir mánaðirnar í 2023 vóru 134,1 mió. krónur meiri goldnar út í lønum samanborið við sama tíðarskeið í 2022. Vøksturin svarar til sløk 8%. **Sí mynd 07.**

**Mynd 05** / Samsveiggj millum arbeiðsloysi og nettotilflyting




**Mynd 07** / Samlaðar lønargjaldingar 2000 - 2022




**Mynd 06** / Tal av løntakarum og tal av arbeiðsleysum 2010 til februar 2023






*Tey 550 fólkini, sum fóru úr Arbeiðsloysis-skipanini í 2022, høvdu í miðal verið arbeiðsleys í 145 dagar, tá tey fóru úr skipanini.*

## Fólk steðga nú longri hjá ALS

Árini frá 2009 til 2013 vístu, at fólk, sum einki arbeiði høvdu, vóru alsamt longri arbeiðsleys. Tey fólkini, sum fóru úr skipanini í 2013, høvdu í miðal verið arbeiðsleys í 254 álmanakkadagar – stívliga átta mánaðir.

Tann gongdin vendi í 2014, tá fólk fyri fyrstu ferð í fimm ár vóru styttri arbeiðsleys enn undanfarna ár, og henda gongdin hevur hildið fram til 2020, tá gongdin vendi aftur. Tey 550 fólkini, sum fóru úr Arbeiðsloysisskipanini í 2022, høvdu í miðal verið arbeiðsleys í 145 dagar, tá tey fóru úr skipanini. Tað er nakað longur samanborið við árið fyri, tá fólk í miðal høvdu verið arbeiðsleys í 129 dagar, tá tey fóru úr ALS.

Ein orsøk til avmarkaðu hækkingina er, at tað vóru fleiri, sum høvdu verið langtíðararbeiðsleys, sum fóru aftur til arbeiðis í 2022 samanborið við í 2021, og tey draga miðal-longdina upp og síggjast væl aftur í hagtølunum, tá samlaða arbeiðsloysið er so lágt sum nú.
**Sí mynd 08.**

**Mynd 08** / Tal av døgum, fólk í miðal hava verið arbeiðsleys – bert tey, sum eru farin úr ALS









**Mynd 09** / Miðvirði (median) av øllum, sum eru farin úr skipanini síðani 2016




**Mynd 10** / Miðallongd á arbeiðsloysi fyri kvinnur og menn frá 2016 til 2022



**Mynd 11** / Miðallongd á arbeiðsloysi býtt á kyn og aldursbólkar 2022




Ein uppgerð yvir øll tey 7.275 fólkini, sum hava verið í ALS síðani 1. januar 2016 og eru farin úr skipanini aftur, vísir, at miðvirðið á longdini á arbeiðsloysunum er 89 álmanakkadagar – slakir tríggir mánaðir. Tað merkir, at helvtin av øllum hesum fólkunum – neyvt 3.638 fólk – vóru farin úr skipanini aftur í seinasta lagi 89 dagar, eftir at tey komu í skipanina. Í miðal høvdu tey sløku 7.275 fólkini steðgað í 142 álmanakkadagar í skipanini.

Tølini eru miðaltøl fyri øll tey, sum hava verið í Arbeiðsloysisskipanini, og tað eru eyðsæð stórir munir á, hvussu leingi fólk steðga. Summi – serliga tey ungu – steðga stutt og fara skjótt aftur til arbeiðis ella at útbúgva seg, meðan tað er ein størri avbjóðing hjá teimum eldru at koma út aftur á arbeiðsmarknaðin.

Hagtølini vísa, at meðan kvinnur í 2021 yvirhøvur vóru longri arbeiðsleysar enn menn, so var munurin minni í 2022. Eldru menninir – teir, sum vóru farnir um hálvthundrað – vóru longri arbeiðsleysir enn kvinnur í sama aldri, og menninir, sum høvdu fylt 60 ár, vóru munandi longri arbeiðsleysir enn kvinnurnar.

Verður hugt at øllum teimum 7.275 fólkunum, sum hava verið í skipanini síðani 1. januar 2016, so vísir tað seg, at fyri stórt sæð allar aldrar hava kvinnur verið longri arbeiðsleysar enn menn á sama aldri.

Tal av døgum, fólk í miðal hava verið arbeiðsleys

**145** dagar

2021: 129 dagar

Onkur undantøku eru. Serliga ungar kvinnur í aldrunum millum 18 og 22 ár vísa seg at hava verið styttri arbeiðsleysar enn menn á sama aldri.

Ikki óvæntað er ein rættiliga greiður samanhangur millum generella arbeiðsloysið í Føroyum og longdina á tíðini, fólk eru arbeiðsleys. Tá arbeiðsloysið – mátað sum fulltíðararbeiðsleys í % av samlaðu arbeiðarafjøldini – minkar, so eru fólk yvirhøvur styttri arbeiðsleys, og tá arbeiðsloysið hækkar, eru fólk longri arbeiðsleys. **Sí mynd 09, 10 og 11.**

# Nú detta aftur fleiri úr skipanini

Sambært reglunum ber til at vera í Arbeiðsloysisskipanini í 648 útgjaldsdagar í eitt fýra ára skeið. Tað svarar til á leið hálvt triðja álmanakkaár, um ein er fulltíðararbeiðsleysur.

Tað merkir, at tá ein persónur røkkur hesar 648 dagarnar, so hevur viðkomandi ikki longur rætt til arbeiðsloysisstuðul frá ALS og dettur tí úr skipanini.

Tá persónur hevur verið úr skipanini í tvey ár, ber aftur til at koma í Arbeiðsloysisskipanina.

Tey trý árini frá 2008 og fram til 2010 vóru tað í miðal á leið 20-30 fólk um árið, sum rukku fullum dagatali og tí duttu úr skipanini.

Í 2011 vaks arbeiðsloysið nógv, og talið av fólkum, sum duttu úr skipanini, vaks eisini munandi, og tey trý árini frá 2011 til 2013 var talið á fólkum, sum duttu úr skipanini vegna fult dagatal, árliga millum 100 og 140.

Hóast talið enn var høgt í 2013, so vendi gongdin tá, og talið fór at minka.

Eitt aðalmál hjá ALS er, at helst skal eingin detta úr Arbeiðsloysisskipanini, tí tey hava brúkt allar 648 dagarnar, og tað er at fegnast um, at bara tvey fólk duttu úr skipanini í 2020 og 2021. Í 2022 vóru tað seks fólk, sum duttu úr skipanini vegna fult dagatal. Tað ber boð um, at hóast arbeiðsloysið er met lágt, so stendur á hjá fleiri at vinna seg út aftur á arbeiðsmarknaðin, og tey verða tí verandi í Arbeiðsloysisskipanini, til tey missa rættin til arbeiðsloysisstuðul. **Sí mynd 12.**

**Mynd 12** / Tal av fólkum, sum eru dottin út vegna fult dagatal





## Snýr seg framvegis um at fara fyrr aftur til arbeiðis

Hóast arbeiðsloysið framvegis er sera lágt, er greiða sannføringin, at tað hevur sera stóran týdning hjá fólki at hava eitt arbeiði at fara til hvønn dag.

Tí verður dentur áhaldandi lagdur á at virka fyri, at fólk sum skjótast fara aftur til arbeiðis ella at útbúgva seg. Fyri at hesi fólkini fáa eitt betri lív, og eisini fyri at tryggja, at føroyskir arbeiðsgevarar so skjótt og lætt sum til ber fáa starvsfólk við teimum førleikunum, teimum tørvar.

Arbeiðið at knýta tættari sambond við bæði arbeiðsgevarar og við viðskiftafólkini, sum einki arbeiði hava, hevur alstóran týdning, og stórur dentur verður lagdur á hendan partin.

Lága arbeiðsloysið hevur við sær, at tað ber til at røkka øll viðskiftafólkini og fáa gott samskifti og gott samstarv við tey øll, og roynt verður av øllum alvi at stuðla viðskiftafólkum at koma sum skjótast aftur til arbeiðis.

Endamálið við øllum virkseminum er at stuðla undir, at fólk fara fyrr aftur til arbeiðis, og at avmarka neiligu árinini, sum arbeiðsloysið hevur við sær.

Í eldhuginum eftir at sleppa at gera mun hava vit á Arbeiðsloysisskipanini kortini altíð í huga, at tað eru menniskju, vit arbeiða saman við. Menniskju, sum eru komin í ta keðiligu støðu, at tey einki arbeiði hava. Tí eiga vit altíð at vera ansin og hava virðing fyri hesum menniskjum, og tað, vit taka stig til, má geva meining – bæði fyri tey og fyri okkum á ALS. Við tí virðingini í huga eru vit sannførd um, at ALS eigur og kann gera mun, og at vit eiga at hava ein virknan leiklut í at stuðla fólki í aftur at nærkast arbeiðsmarknaðinum.




*Á ALS verður áhaldandi arbeitt við at gagnnýta møguleikarnar við nýggjari tøkni, og millum annað verða mentar nýggjar tænastur, sum fara at verða tøkar á Vanganum*

## Kunningartøkni

Kunningartøkni er og verður ein alt meiri týðandi partur av gerandisdegnum, og tað eru fleiri ymiskar kt-skipanir, ið verða nýttar á ALS. Summar eru standardskipanir, meðan aðrar eru serligar skipanir, sum tað, hóast keyptar uttanífrá, er neyðugt at laga til, so tær standa mát við tørvin hjá ALS. Aftur aðrar eru so serligar, at neyðugt er at menna tær júst til ALS. Dømi um tað er fakskipanin, nevnd Smúffan, sum er ment innanhýsis av starvsfólki hjá ALS.

Á ALS verður áhaldandi arbeitt við at gagnnýta møguleikarnar við nýggjari tøkni, og talgildi pallurin, sum Talgildu Føroyar hevur ment saman við undirveitarum seinastu árini, og sum ALS hevur verið við til at fíggjað, gevur fleiri møguleikar fyri talgildum samskifti við viðskiftafólkini.

Á Arbeiðsloysisskipanini verður millum annað arbeitt við at menna nýggjar loysnir og tænastur, sum verða lagdar á vangan, og sum ætlandi fara at gera samskiftið við viðskiftafólkini tryggari, skjótari og lættari. Seinni í 2023 er ætlanin at hava eina nýggja sjálvgreiðslu á Vanganum har tað, umframt at vátta arbeiðsloysi, millum annað eisini fer at bera til at fylla umsókn um arbeiðsloysisstuðul út umframt, at aðrar tænastur eisini fara at vera á Vanganum.

## Ársfundurin

Í mai mánaði í 2013 var fyrsti ársfundurin eftir ein steðg síðani miðskeiðis í nítiárunum hildin.

Ársfundurin er at meta sum eitt slag av aðalfundi, har tey, ið varða av Arbeiðsloysisskipanini, hava høvið at kunna seg um virksemið, um støðuna og um útlitini fyri framtíðina.

Orsakað av korona farsóttini var eingin ársfundur í 2020, og síðani hevur eingin ársfundur verið. Ætlanin er heldur ikki at hava ársfund í 2023, men møguliga verður tátturin við ársfundum tikin upp aftur seinni.






## Lógarbroytingar

Stýrið fyri ALS hevur arbeitt við eini heildarendurskoðan av allari Arbeiðsloysisskipanini, og hevur latið avvarðandi landsstýrisfólki tilmæli um at gera ymsar broytingar í skipanini.

Endamálið við endurskoðanini er at dagføra skipanina, so hon betur hóskar til føroyska arbeiðsmarknaðin, sum hann er nú, og at tryggja, at hon á besta hátt lýkur krøvini til eina dagførda, framkomna Arbeiðsloysisskipan, ið á bestan hátt røkkur endamálinum við skipanini.

Enn eru ongar av ætlaðu broytingunum framdar, og tað er ikki endaliga greitt, hvørjar broytingar landsstýriskvinnan í arbeiðsmarknaðarmálum fer at gera, men mest sannlíkt er tó, at broytingar verða gjørdar í fiskavirkisskipanini áðrenn summarfrítíðina í 2023.

## Fasti Gerðarrættur

Arbeiðsloysisskipanin hevur avtalu við Fasta Gerðarrætt at hýsa hesum stovni og at umsita ein part av hesi skipan. Fasti Gerðarrættur endurrindar Arbeiðsloysisskipanini fyri umsitingina, og í 2022 var samlaða upphæddin 66.600 krónur.

## Trygdargrunnur fiskivinnunar

Galdandi frá 1. juli 2011 hevur Arbeiðsloysisskipanin eisini avtalu við Trygdargrunn fiskivinnnunar um, at tey halda til í hølunum hjá ALS.

Fyri samhýsingina rindaði Trygdargrunnurin ALS 960 tús. krónur í 2022.

Trý fólk umframt ein lærlingur hava starvast hjá Trygdargrunninum, men sambært samstarvsavtaluni millum ALS og Trygdargrunnin eru trý teirra formliga í starvi hjá ALS, men starvast fyri Trygdargrunnin.

ALS rindar lønarkostnaðin av starvsfólkunum, men Trygdargrunnurin ber ALS allar útreiðslur av hesum aftur.

Samlaða upphæddin, sum Trygdargrunnurin bar ALS aftur fyri starvsfólkakostnaðir í 2022, var 1.702.758 krónur. Í upphæddini er samsýning til stýrið fyri Trygdargrunnin við.

Samanlagt vóru 3,3 ársverk hjá Trygdargrunninum í 2022.

## Stýrið

Sambært løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing frá 13. juni 1997, við seinni broytingum, verður stýrið fyri Arbeiðsloysisskipanina valt fyri fýra ár í senn.

Stýrið, sum situr nú, tók við 1. oktober 2021, og stýrið skal tí veljast av nýggjum at taka við 1. oktober 2025

**Í stýrinum sita:**

Eyðfinnur Jacobsen, formaður
Anita Fuglø
Georg F. Hansen
Magnus Pauli Glerfoss
Niels Winther
Óluva í Gong
Stefan í Skorini

Landsstýriskvinnan við umhvørvis- og arbeiðsmarknaðarmálum velur eftir tilráðing frá løntakarafeløgum og arbeiðsgevarafeløgum tríggjar stýrislimir umboðandi løntakarafeløgini og tríggjar stýrislimir umboðandi arbeiðsgevarar. Harafturat velur landsstýrismaðurin eisini formann ella forkvinnu, sum verður vald uttan tilráðing frá øðrum.



*Arbeiðið at knýta tættari sambond við bæði arbeiðsgevarar og við viðskiftafólkini, sum einki arbeiði hava, hevur alstóran týdning, og stórur dentur verður lagdur á hendan partin.*

# BÚSKAPUR
# 2022

## Inngjøldini hækka.

## ALS-gjaldið var 1,25% frá 1. januar 2012 fram til 1. januar 2021, tá ALS-gjaldið lækkaði niður í 1,0%.

Hesi árini frá 2012 til og við 2020 var ein støðugur vøkstur í samlaðu inngjøldunum hjá ALS. Tá ALS-gjaldið lækkaði 1. januar 2021, lækkaðu samlaðu inngjøldini. Í 2020 vóru samlaðu inngjøldini 253,2 mió. krónur, meðan tey í 2021 vóru 208,3 mió. krónur.

Lækkingin var á leið tað, sum roknað var við, tá ALS-gjaldið varð lækkað.

Í 2022 vóru samlaðu inngjøldini 221,3 mió. krónur.

Hækkingin stavar burturav frá, at samlaðu lønarútgjald-ingarnar í Føroyum hækkaðu við 544 mió. krónur í 2022 – úr 10,6 mia. krónum í 2021 upp í 11,2 mia. krónur í 2022.

Myndin niðanfyri vísir gongdina í ALS-gjaldinum og samlaðu inngjøldunum, síðani Arbeiðsloysisskipanin varð stovnað í 1992. Gula strikan vísir ALS-gjaldið (%), meðan stabbarnir vísa samlaðu inngjøldini í krónum.
**Sí mynd 13.**

**Mynd 13** / ALS-gjald og samlað inngjøld 1992 – 2022



**Mynd 14** / Samlað útgjøld 1992 - 2022




# Útgjøldini minka

Arbeiðsloysið hevur verið støðugt minkandi síðani ársbyrj-an í 2011, tá tað var upp á tað mesta í nýggjari tíð. Í februar mánaði í 2011 var arbeiðsloysið 8,1%. Í 2022 var arbeiðs-loysið í miðal 0,8% fyri árið.

Samlaðu útgjøldini eru neyvt knýtt at arbeiðsloysinum, og tí eru samlaðu útgjøldini eisini minkað støðugt hesi árini. Serliga korona-skipanin hevði kortini við sær, at útgjøldini hækkaðu munandi í 2020, men síðani hevur korona ikki ávirkað útgjøldini stórvegis.

Í 2022 vóru samlaðu útgjøldini av arbeiðsloysisstuðli 62,8 mió. krónur. Tað var 14,0 mió. krónur minni enn árið fyri. Minkingin svarar til 19%.

Útgjøldini um fiskavirkisskipanina hækkaðu við 1,5 mió. krónum í 2022. Úr 26,1 mió. krónum í 2021 upp í 27,6 mió. krónur í 2022. Upphæddin, ið var goldin í arbeiðsloysis-stuðli um fiskavirkisskipanini í 2022, var tann hægsta síðani 2010, tá 28,5 mió. krónur vóru goldnar.

Tá gjaldið av vanligum arbeiðsloysisstuðli lækkar, meðan gjaldið av arbeiðsloysisstuðli um fiskavirkisskipanina hækkar, veksur fiskavirkisskipanin lutfalsliga, og í 2022 var útgjaldið úr fiskavirkisskipanini sløk 44% av samlaða arbeiðsloysisstuðlinum.

Talið av fólkum, sum fingu útgjald um fiskavirkisskipanina í 2022, var í miðal 279 fólk. Tað er nakað lægri enn árið frammanundan, tá talið var 323 fólk.

Miðalupphæddin hvørt útgjaldsskeið var væl hægri í 2022, enn hon var í 2021 – 1.654 krónur um vikuna í miðal í mun til 1.428 krónur um vikuna árið fyri.

Starvsvenjing hevur víst seg at vera eitt gott amboð at fáa fólk at knýta samband við arbeiðsmarknaðin aftur. Samlaði kostnaðurin av starvsvenjing kvinkaði uppaftur í 2022, tá kostnaðirnir vóru slakar 2,6 mió. krónur. Til samanberingar var kostnaðurin 2,3 mió. krónur í 2021.

Peningaligi týdningurin fyri ALS av starvsvenjingini er avmarkaður, tí upphæddirnar, sum vera goldnar út í sambandi við starvsvenjingar, høvdu óansæð verið goldnar út sum vanligur arbeiðsloysisstuðul, hevði eingin starvs-venjing verið.

Upphæddirnar, ið hava verið brúktar til arbeiðsmarknaðar-átøk og førleikamenning hjá viðskiftafólkunum, vóru vaksandi fram til 2014, men so hvørt sum arbeiðsloysið er minkað, er virksemið lagað til, og minni upphæddir eru eisini brúktar til hetta endamál. Upphæddin í 2021 var stívliga 603 tús. krónur, og í 2022 var hon 611 tús. krónur. Talan er í høvuðsheitum um stór koyrikort, trukk- og kranaskeið umframt onnur skeið.

**Sí mynd 14 og mynd 15.**

**Mynd 15** / Samlaðu útgjøldini eru býtt soleiðis seinastu árini

| Mió. krónur | 2022 | 2021 | 2020 | 2019 | 2018 | 2017 | 2016 | 2015 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Vanligur arbeiðsloysisstuðul | 28,8 | 43,5 | 47,3 | 28,3 | 45,4 | 57,1 | 71,5 | 92,2 |
| Fiskavirkisskipanin | 25,6 | 24,4 | 19,9 | 13,8 | 17,0 | 15,4 | 20,2 | 24,3 |
| Hjálparpakki 1 | - | - | 128,5 | - | - | - | - | - |
| Eftirlønir | 4,2 | 4,8 | 4,3 | 2,3 | - | - | - | - |
| Starvsvenjing | 2,6 | 2,3 | 1,9 | 2,2 | 3,3 | 3,7 | 5,8 | 7,5 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | 1,1 | 1,3 | 1,4 | 0,9 | 1,3 | 1,5 | 1,9 | 2,3 |
| Førleikamenning og arbeiðsmarknaðarátøk | 0,6 | 0,6 | 2,6 | 3,2 | 4,2 | 4,2 | 4,8 | 6,5 |
| **Íalt** | **62,8** | **76,9** | **206,0** | **60,7** | **71,3** | **81,8** | **104,0** | **132,8** |

**Mynd 16** / Tal av ársverkum




# Starvsfólkakostnaðir

Talið av starvsfólkum hevur verið minkandi seinastu nógvu árini og er farið úr 44 ársverkum í 2015 niður í 26,6 í 2022. Hetta er eitt hálvt ársverk meiri enn árið fyri, og kemur av, at kt-toymið er styrkt.

Samanborið við, tá talið av starvsfólkum var hægst í 2015 er talan um eina minking á 18 ársverk, sum svarar til eina minking á 40%.

Komandi ár verður talið av ársverkum væntandi óbroytt. Minkandi arbeiðsloysi, nýggjar kt-loysnir, umskipanir og tillagingar eru høvuðsorsøkir til, at starvsfólkahópurin er minkaður seinastu árini.

Samlaðu starvsfólkaútreiðslurnar vóru 16,0 mió. krónur í 2022. Tað eru 473 tús. krónur meiri enn í 2021 svarandi til 3%. **Sí mynd 16.**

# Rakstrarkostnaðir

Samlaðu rakstrarkostnaðirnir í 2022 vóru 4,3 mió. krónur. Tað er 375 tús. krónur minni enn árið frammanundan. **Sí mynd 17.**

Við hesum ber til at staðfesta, at vanligu rakstrarkostnaðirnir eru teir lægstu síðani 1995 - í 27 ár. Tá er hædd ikki tikin fyri prísvøkstri og broyttum roknskaparligum meginreglum.

Við í rakstarkostnaðunum eru eisini útreiðslur av Losjuni, sum ALS keypti á sumri í 2017.

Myndin til høgru vísir gongdina í samlaðu fyrisitingarútreiðslunum, avskrivingunum og mvg síðani 2004. Upphæddirnar eru í føstum 2004-prísum. **Sí mynd 18.**

Sum myndin vísir, so eru hesar útreiðslur minkaðar úr 14,1 mió. krónum í 2012 niður í 4,2 mió. krónur í 2022. Hetta er ein minking á 9,9 mió. krónur – svarandi til 71% eftir 10 árum.

Høvdu hesar útreiðslur verið óbroyttar hesi 10 árini, so høvdu tær samanlagt havt verið 62,5 mió. krónur hægri, enn tær hava verið.

Gongdin við munandi sparingum hesi árini er úrslit av einum miðvísum arbeiði at fáa meiri fyri minni og spara allastaðni, har tað loysir seg og gevur meining. Miðað verður eftir, at hesar útreiðslur komandi árini verða á sama stigi, og málið er, at ALS framhaldandi verður rikið á skynsaman hátt.

Verður kostnaðurin av at reka føroysku Arbeiðsloysisskipanina borin saman við kostnaðin av at reka donsku a-kassarnar, so vísir tað seg, at tað aftur í 2022 var bíligari at reka ALS samanborið við danskar a-kassar.

Tað kostaði í miðal 60 krónur um mánaðin fyri hvønn løntakara – sum allir eru limir í ALS – at reka ALS. Til samanberingar kostar tað 83 krónur fyri hvønn lim at reka bíligasta danska a-kassan, sum er DSA, og sum hevur á leið 150 tús. limir.

Tann danski a-kassin, sum hevur á leið sama limatal sum ALS, er AJKS, sum 1. januar 2023 hevði 24.578 limir. Hjá teimum kostaði tað 100 krónur fyri hvønn limin at reka a-kassan. Tað er munandi meiri samanborið við tað, tað kostar at reka ALS.

Tað er í hesum sambandi vert at hava í huga, at donsku a-kassarnir bert umsita útgjald av arbeiðsloysisstuðli, meðan arbeiðsávísing ikki er partur av virkseminum.

Føroyska Arbeiðsloysisskipanin umsitur bæði útgjald av arbeiðsloysisstuðli, umframt at arbeiðsávísing eisini er týðandi partur av virkseminum. Hevði tað í rakstrarútreiðslunum hjá ALS verið tikið hædd fyri hesum, hevði munurin á tí, tað kostar at reka ALS og danskar a-kassar, verið væl størri.

**Mynd 18** / Fyrisitingarútreiðslur, avskrivingar og mvg í føstum 2004-prísum




**Mynd 17** / Samlaðir rakstrarkostnaðir 1992 – 2022 í ársins prísum




**Mynd 19** /Kostnaður til fyrisiting, kr/lim - samanbering við danskar a-kassar



## Úrslit og eginogn

Úrslitið fyri avskrivingar og fíggjarpostar var eitt avlop á 139,3 mió. krónur. Til samanberingar var hetta úrslitið eitt avlop á 112,2 mió. krónur í 2021.

Avskrivingarnar í 2022 vóru 419 tús. krónur, sum er tað sama sum í 2021.

Tað eru bygningarnir við Tinghúsvegin – ALS-bygningurin og Losjan - sum verða avskrivaðir.

Arbeitt hevur verið við at fyrireika umbygging av veg-hæddini í húsinum hjá ALS, so arbeiðsumstøðurnar í størri mun standa mát við tørvin. Kostnaðurin av serkønari hjálp í tí sambandinum er ognarførdur og verður avskrivaður saman við samlaða kostnaðinum av umbygginini.

Virðisbrævaognirnar vuksu úr 1.035,5 mió. krónum við árslok 2021 til 1.059,3 mió. krónur við árslok 2022.

Í 2021 vóru samlaðu fíggjarinntøkurnar 23,2 mió. krónur, sum svarar til eina renting á 2,2%.

Í 2022 var samlaða úrslitið av fíggjarognunum ein missur á 113,1 mió. krónur, sum svaraði til eina renting á – 10,7%. Rentingin av partabrøvunum var – 17,68%, meðan rentingin av lánsbrøvunum var ein missur á – 8,57%.

Við ársbyrjan í 2022 var eginognin 1.082,2 mió. krónur, og við árslok var hon vaksin upp í 1.107,0 mió. krónur. **Sí mynd 21.**

Eginognin er nú tann størsta, hon nakrantíð hevur verið í søguni hjá ALS.

Eginogn 2022

**1.107** mió. kr.

2021: 1.082,2 mió. kr.

Søgan hevur víst, at tað kann vera skjótt hvønn vegin, og at arbeiðsloysið skjótt kann vaksa, og at eginognin og harvið fíggjarligi mátturin hjá skipanini tí kann vikna skjótt. Tað staðfestir týdningin av, at skipanin er í eini tryggari legu, so hon verður fíggjarliga haldfør nógv ár fram í tíðina.

Í kjalarvørrinum av jaligu gongdini, sum hevur verið á arbeiðsmarknaðinum seinastu árini, eru broytingar gjørdar í Arbeiðsloysisskipanini, og skipanin er lagað til verandi umstøður. Inngjaldið lækkaði úr 1,25% niður í 1,0% 1. januar 2021, og stýrið fyri ALS hevur heitt á landsstýriskvinnuna at lækka ALS-gjaldið niður í 0,8%. Hetta er tó ikki gjørt enn.

*Søgan hevur víst, at tað kann vera skjótt hvønn vegin, og at arbeiðsloysið skjótt kann vaksa.*

**Mynd 21** / Eginogn 1992 – 2022






# Útlit fyri 2023

Útlitini fyri 2023 eru góð. Arbeiðsloysið var metlágt í 2022, og hevur framvegis verið lágt tað, ið farið er av 2023.

Virksemið er nógv, og føroyskum arbeiðsgevarum tørvar framvegis arbeiðsmegi, og 112 fyritøkur er góðkendar til Fast Track-skipanina, sum ger tað lættari at fáa útlendingar til Føroyar at arbeiða. Tað ber boð um, at fyritøkurnar framvegis hava nógv at gera, og sannlíkt fara at hava nógv at gera eina tíð fram.

Í eini roynd at basa stóra prísvøkstrinum, sum hevur verið seinastu tíðina, hava tjóðbankar hækkað rentuna fleiri ferðir seinasta árið, og prísirnir á láns- og partabrøvum eru lækkaðir nógv. Fyri ALS merkti tað, at ALS hevði ein miss á 113,1 mió. krónur av fíggjarognunum. Fyrsta ársfjórðing í 2023 hevur gongdin verið betur, enn hon var í 2022, og nakað av missinum er vunnið aftur. Neyvt vóru fíggjarinntøkurnar 14,9 mió. krónur í fyrsta ársfjórðingi í 2023. Vónirnar eru, at støðan fer at batna, sum árið 2023 gongur, og at sum mest av missinum frá 2022 verður vunnin aftur.

Tað er nú meiri enn eitt ár síðani, at Russland gjørdi innrás í Ukraina, men tað er enn óvist, hvussu kríggið fer at ávirka Føroyar í longri tíð. Tað er eisini óvist, hvørt fiskiveiðiavtalan við Russland verður endurnýggjað, tá verandi avtala gongur út, og tað er ógreitt, hvørjar avleiðingarnar kunnu fara at verða, verður avtalan ikki endurnýggjað. Men í løtuni eru ikki útlit til, at arbeiðsloysið fer at vaksa stórvegis í 2023.

Hinvegin er arbeiðsloysið so lágt, at tað kann illa verða lægri, tí tað vil altíð vera ein ávísur meldur av fólki inn á og út av arbeiðsmarknaðinum. Eitt “natúrligt” arbeiðsloysi. Tað ber kanska til at siga, at tað “natúrliga” arbeiðsloysið hevur verið á leið 1,5% seinastu fimm árini.

Bæði talið av løntakarum og samlaðu lønargjaldingarnar hava verið vaksandi í nógv ár, og tað hava ongantíð verið so nógvir løntakarar í Føroyum, og tað hevur ongantíð áður verið goldin so stór upphædd út í lønum í Føroyum sum nú.

Vøksturin er tó minkandi, og tað er ivasamt, um lønargjaldingarnar framhaldandi fara at vaksa við somu ferð sum undanfarin ár, men tørvurin á arbeiðsmegi er framvegis stórur, og tekin eru ikki um, at virksemið fer at minka í 2023.

Samanumtikið eru útlitini fyri 2023 góð. Arbeiðsloysið fer væntandi ikki at vaksa stórvegis, og fíggjarliga eru útlitini hjá ALS góð.

*Tað ber kanska til at siga, at tað “natúrliga” arbeiðsloysið hevur verið á leið 1,5% seinastu fimm árini.*




Gjaldførið í 2022

**1.076** mió. kr.

2021: 1.050 mió. kr.

## Gongdin í virkseminum og fíggjarligu viðurskiftunum hjá skipanini

Rakstrarroknskapurin fyri tíðarskeiðið frá 1. januar 2022 til 31. desember 2022 vísir eitt avlop á 24.889.589 krónur móti einum avlopi á 134.107.413 krónur fyri tíðarskeiðið frá 1. januar 2021 til 31. desember 2021.

Havandi ógvið á fíggjarmarknaðunum í 2022 í huga eru stýrið og stjórn nøgd við úrslitið fyri 2022.

Gjaldførið er gott, og tøkur peningur, áogn og lætt umsetilig virðisbrøv hjá Arbeiðsloysisskipanini vuksu í 2022 við 25,3 mió. krónum úr 1.050.587.238 krónum upp í 1.075.926.830 krónur.

# Hendingar eftir roknskaparlok

Einki er hent eftir árslok, sum ávirkar úrslitið fyri 2022 ella fíggjarstøðuna við árslok 2022.





# ÁRSROKNSKAPUR


| | |
|---|---|
| Nýttur roknskaparháttur | 44 |
| Rakstrarroknskapur 1. januar - 31. desember 2022 | 47 |
| Fíggjarstøða tann 31. desember 2022 | 48 |
| Peningastreymsuppgerð 1. januar - 31. desember 2022 | 50 |
| Notur til ársfrásøgnina | 52 |




# Nýttur roknskaparháttur

Ársfrásøgnin hjá ALS fyri 2022 er gjørd í samsvari við ásetingarnar í ársroknskaparlógini fyri miðalstór feløg í bólki C við teimum tillagingum, sum stýrið hevur mett neyðugt og eftir løgtingslóg nr. 113 frá 13. juni 1997 um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 177 frá 17. desember 2020. Talan er um hesar tillagingar í mun til ársroknskaparlógina:

- Aðrar materiellar ognir enn grundøki og bygningar verða ikki tiknar við sum ognir í fíggjarstøðuni.
- Mettur framtíðarkostnaður viðvíkjandi arbeiðsloysisstuðuli til tey arbeiðsleysu, sum eru í skipanini, verður ikki tikin við í fíggjarstøðuna sum ein avsett skylda. Metta skyldan verður hinvegin upplýst sum ein eventualskylda í einari notu til ársroknskapin.
- Uppsetanin av rakstrarroknskapinum víkur frá skemakravinum í ársroknskaparlógini. Inngjøld og útreiðslur til arbeiðsleys eru drigin saman í serligt millum úrslit, áðrenn bruttoúrslit.

Tann nýtti roknskaparhátturin er óbroyttur í mun til undanfarna ár. Tó er uppsetanin av rakstrarroknskapinum broytt í 2021 í mun til 2020, soleiðis at roknskaparposturin "Aðrar inntøkur" er tikin burtur úr "Aðrir uttanhýsis kostnaðir" og vístur á serstakari linju. Hetta hækkar postin "Aðrir uttanhýsis kostnaðir" í 2020 við 1.087.584 kr.

### Um innrokning og virðisáseting

Inntøkur verða innroknaðar í rakstrarroknskapin, so hvørt sum tær verða vunnar. Harumframt verða virðisjavningar av fíggjarligum ognum og skyldum innroknaðar. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis allir kostnaðir, íroknað avskrivingar og niðurskrivingar, innroknaðir.

Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at grunnurin í framtíðini fær fíggjarligar ágóðar, og virðið á ognini kann gerast upp álítandi.

Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at grunnurin í framtíðini skal av við fíggjarligar ágóðar, og virðið á skylduni kann gerast upp álítandi.

At byrja við verða ognir og skyldur innroknaðar til kostprís. Síðani verða ognir og skyldur virðisásettar sum lýst niðanfyri fyri einstøku roknskaparpostarnar.

Ávísar fíggjarligar ognir og skyldur verða virðisásettar til amortiseraðan kostprís, og sostatt verður ein konstant effektiv renta innroknað yvir gildistíðina. Amortiseraður kostprísur verður uppgjørdur sum upprunaligur kostprísur við frádrátti av møguligum avdráttum og ískoyti/frádrátti av samlaðu amortiseringini av muninum millum kostprís og áljóðandi virði.

Í sambandi við innrokning og virðisáseting verður hædd tikin fyri væntaðum missum og vandum, sum koma áðrenn ársfrásøgnin verður løgd fram, og sum staðfesta ella avsanna viðurskifti, ið vóru til staðar fíggjarstøðudagin.



# Rakstrarroknskapurin

**Inngjøld**
Inngjøld frá arbeiðsgevarum og løntakarum verða innroknað í rakstrarroknskapin, tá lønin, sum ALS gjaldið verður roknað av, verður goldin.

Inngjøld frá sjálvstøðugum vinnurekandi og sjálvboðin arbeiðsloysistrygging verða innroknað, tá trygging og váðaskifti er farið fram áðrenn árslok.

**Aðrar inntøkur**
Aðrar rakstrarinntøkur fevna um roknskaparupphæddir av lítlum týdningi ímun til høvuðsvirksemið hjá grunninum.

**Útgjøld og útreiðslur til arbeiðsleys**
Útgjøld til vanligan arbeiðsloysisstuðul, til arbeiðsloysisstuðul umvegis fiskavirkisskipanina, og til útreiðslur til starvsvenjing verða tikin við í rakstrarroknskapinum, tá hesi eru útgoldin. Útgjøldini eru tíðargreinaði soleiðis, at tey útgjøld, ið ikki eru útgoldin áðrenn 31. desember, men rætturin er vunnin í roknskaparárinum, eru tikin við sum skyldugur arbeiðsloysisstuðul undir skuld í fíggjarstøðuni við árslok í roknskaparárinum.

Útreiðslur til arbeiðsleys fevnir um rakstrarútreiðslur av Fjølsmiðjuni, umframt útreiðslur til førleikamenning av viðskiftafólkunum hjá ALS.

**Aðrir uttanhýsis kostnaðir**
Aðrir uttanhýsis kostnaðir fevnir um kostnaðir til lýsingar, umsiting, hølí, innbúgv, kt, viðlíkahald, miss uppá skuldarar v.m. Harumframt verða vanligar íløgur í eitt nú rakstrartól og innbúgv útreiðsluførd sum aðrir uttanhýsis kostnaðir.

**Starvsfólkakostnaðir**
Starvsfólkakostnaðir fevnir um løn og samsýning umframt lønartengdar kostnaðir.

**Av- og niðurskrivingar**
Av- og niðurskrivingar fevna um ársins av- og niðurskrivingar upp á materiella støðisogn.

**Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir**
Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir verða tiknir við í rakstrarroknskapin við teirri upphædd, sum viðvíkur roknskaparárinum. Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir fevna um rentur, kursvinning og –tap viðvíkjandi virðisbrøvum og vinningsbýti.

**Annar skattur og gjøld**
Annar skattur og gjøld fevnir um meirvirðisgjald, ið stavar frá keypi av vørum og tænastum. Sambært løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum er Arbeiðsloysisskipanin undantikin skattskyldu.

# Fíggjarstøðan

**Materiell støðisogn**
Materiell støðisogn verður virðisásett til kostprís við frádrátti av samlaðum av- og niðurskrivingum.

Avskrivingargrundarlagið er kostprísur við frádrátti av væntaðum restvirði eftir lokna nýtslutíð. Grunddøki verða ikki avskrivað.

Kostprísur er útveganarprísur umframt kostnaðir, ið beinleiðis eru knýttir at útveganini til dagin, tá ið ognin er klár at taka í nýtslu.

Avskrivingin er eins stór fyri tey einstøku roknskaparárini og er grundað á hesar metingar um nýtslutíðina á ognunum:

| | Brúkstíð | Restvirði |
|---|---|---|
| Bygningar | 20-50 ár | 0-32 % |

Vinningur ella tap verða innroknað í rakstrarroknskapin undir ávikavist aðrar rakstrarinntøkur ella aðrar rakstrarkostnaðir.

**Onnur virðisbrøv og kapitalpartar, støðisogn**
Kapitalpartar verða virðisásettir til dagsvirði.

**Áogn**
Áogn verður virðisásett til amortiseraðan kostprís, sum vanliga svarar til áljóðandi virði, við frádrátti av væntaðum missi.

**Virðisbrøv og kapitalpartar**
Virðisbrøv og kapitalpartar, ið eru innroknaðir undir ogn í umferð, verða virðisásettir til dagsvirði (børskursin) við roknskaparlok. Dagsvirðið verður ásett út frá seinast skrásetta sølukursinum.

**Skyldur**
Onnur skuld verður virðisásett til amortiseraðan kostprís, sum vanliga svarar til áljóðandi virði.

# Peningastreymsuppgerð

Peningastreymsuppgerðin vísir peningastreymar grunsins í árinum býtt á økini rakstrarvirksemi, íløguvirksemi og fíggjarvirksemi og broytingar í tøkum peningi í árinum umframt tøka pening grunsins við ársbyrjan og ársenda.

**Peningastreymur frá rakstrarvirksemi**
Peningastreymurin frá rakstrarvirkseminum verður uppgjørdur sum ársins úrslit javnað fyri ikki kontantar rakstrarupphæddir og broytingar í arbeiðskapitali. Arbeiðskapitalurin fevnir um ogn í umferð frádrigið stuttfreistaða skuld og tær upphæddir, sum eru partur av tøka peninginum.

**Peningastreymur frá íløguvirksemi**
Peningastreymurin frá íløguvirkseminum fevnir um gjøld í sambandi við keyp ella sølu av feløgum og virksemi umframt keyp ella sølu av immateriellari, materiellari og fíggjarligari støðisogn.

**Peningastreymur frá fíggingarvirksemi**
Peningastreymurin frá fíggjarvirkseminum fevnir um broytingar í støðd ella samanseting av stovnsfæi grunsins og kostnaðum knýttir at hesum umframt upptøku av lánum og gjaldan av avdráttum.

**Tøkur peningur**
Tøkur peningur fevnir um tøkar peningaupphæddir og stuttfreistað virðisbrøv, sum uttan forðing kunnu umbýtast til tøkan pening, og har vandin fyri virðisbroytingum ongan týdning hevur.

**Yvirlit yvir høvuðs- og lyklatøl**
Frágreiðing til lyklatølini.

**Høvuðsavkast**
$$\frac{\text{Úrslit áðrenn fíggjarpostar x 100}}{\text{Ognir til samans}}$$

**Tryggleikastig**
$$\frac{\text{Eginogn ultimo x 100}}{\text{Ognir til samans við árslok}}$$

**Eginpeningsavkast**
$$\frac{\text{Vanlig úrslit eftir skatt x 100}}{\text{Miðal eginogn}}$$



# Rakstrarroknskapur
# 1. januar - 31. desember 2022

| | Nota | 2022 kr. | 2021 kr. |
|---|---|---|---|
| Inngjøld | 8 | 221.310.109 | 208.252.071 |
| Aðrar rakstrarinntøkur | 9 | 1.113.300 | 1.083.157 |
| Útgjøld og útreiðslur til arbeiðsleys | 10 | -62.815.811 | -76.898.970 |
| **Skiftisavlop** | | **159.607.598** | **132.436.258** |
| Aðrir uttanhýsis kostnaðir | 11 | -4.278.759 | -4.653.880 |
| **Bruttoúrslit** | | **155.328.839** | **127.782.378** |
| Starvsfólkakostnaður | 1 | -16.028.549 | -15.556.018 |
| Av- og niðurskrivingar | | -419.269 | -419.269 |
| **Úrslit áðrenn fíggjarpostar** | | **138.881.021** | **111.807.091** |
| Fíggjarligar inntøkur | | 13.788.620 | 23.241.651 |
| Fíggjarligir kostnaðir | | -126.859.330 | -79.674 |
| **Úrslit áðrenn skatt** | | **25.810.311** | **134.969.068** |
| Annar skattur og gjøld | | -920.722 | -861.655 |
| **Ársúrslit** | | **24.889.589** | **134.107.413** |

# Fíggjarstøða tann 31. desember 2022

| OGN | Nota | 2022 kr. | 2021 kr. |
|---|---|---|---|
| Grundøki og bygningar | | 35.067.111 | 34.268.597 |
| **Materiell støðisogn** | **2** | **35.067.111** | **34.268.597** |
| | | | |
| Onnur virðisbrøv og kapitalpartar | 3 | 5.056.250 | 5.056.250 |
| **Fíggjarlig støðisogn** | | **5.056.250** | **5.056.250** |
| | | | |
| **Støðisogn til samans** | | **40.123.361** | **39.324.847** |
| | | | |
| Áogn av tænastum | 12 | 11.359.348 | 10.792.343 |
| Onnur áogn | 13 | 12.750 | 233.083 |
| **Áogn** | | **11.372.098** | **11.025.426** |
| | | | |
| Virðisbrøv | 4 | 1.054.216.990 | 1.030.417.956 |
| **Virðisbrøv** | | **1.054.216.990** | **1.030.417.956** |
| | | | |
| **Tøkur peningur** | **14** | **10.337.742** | **9.143.856** |
| | | | |
| **Ogn í umferð til samans** | | **1.075.926.830** | **1.050.587.238** |
| | | | |
| **Ogn til samans** | | **1.116.050.191** | **1.089.912.085** |



# Fíggjarstøða tann 31. desember 2022

| SKYLDUR | Nota | 2022 kr. | 2021 kr. |
|---|---|---|---|
| Stovnsfæ | | 93.840.006 | 93.840.006 |
| Fluttur vinningur | | 1.013.208.852 | 988.319.262 |
| **Eginogn** | **5** | **1.107.048.858** | **1.082.159.268** |
| | | | |
| Vøru- og tænastuskuld | | 1.032.588 | 992.483 |
| Skyldugur arbeiðsloysisstuðul | 15 | 6.272.654 | 5.255.728 |
| Onnur skuld | 16 | 1.696.091 | 1.504.606 |
| | | | |
| **Stuttfreistað skuld** | | **9.001.333** | **7.752.817** |
| | | | |
| **Skuld til samans** | | **9.001.333** | **7.752.817** |
| | | | |
| **Skyldur til samans** | | **1.116.050.191** | **1.089.912.085** |
| | | | |
| Eventualskyldur v.m. | 6 | | |
| Nærstandandi partar | 7 | | |

# Peningastreymsuppgerð 1. januar - 31. desember 2022

| | Nota | 2022 kr. | 2021 kr. |
|---|---|---|---|
| Ársúrslit | | 24.889.589 | 134.107.413 |
| Avskrivingar | | 419.269 | 419.269 |
| Broyting í rakstrarkapitali | | 901.844 | -1.199.558 |
| **Peningastreymur frá rakstri áðrenn fíggjarpostar** | | **26.210.702** | **133.327.124** |
| | | | |
| **Peningastreymur frá rakstrarvirksemi** | | **26.210.702** | **133.327.127** |
| | | | |
| Keyp av materiellari støðisogn | | -1.217.782 | 0 |
| Søla av fíggjarligari støðisogn v.m. | | 0 | 5.029.232 |
| **Peningastreymur frá íløguvirksemi** | | **-1.217.782** | **5.029.232** |
| | | | |
| **Broyting í tøkum peningi** | | **24.992.920** | **138.356.356** |
| | | | |
| Tøkur peningur | | 9.143.856 | 16.628.446 |
| Virðisbrøv | | 1.030.417.956 | 884.577.010 |
| | | | |
| Tøkur peningur 1. januar | | 1.039.561.812 | 901.205.456 |
| **Tøkur peningur 31. desember** | | **1.064.554.732** | **1.039.561.812** |
| | | | |
| **Tøkur peningur kann sundurgreinast soleiðis:** | | | |
| Tøkur peningur | | 10.337.742 | 9.143.856 |
| Virðisbrøv | | 1.054.216.990 | 1.030.417.956 |
| **Tøkur peningur 31. desember** | | **1.064.554.732** | **1.039.561.812** |





# Notur til ársfrásøgnina

| 1 | Starvsfólkakostnaður | 2022 kr. | 2021 kr. |
|---|---|---|---|
| | Lønir | 13.114.699 | 12.826.879 |
| | Eftirlønartryggingar | 2.003.525 | 1.856.407 |
| | Onnur lønartengd gjøld | 726.540 | 726.248 |
| | Annar starvsfólkakostnaður | 183.785 | 146.484 |
| | | **16.028.549** | **15.556.018** |
| | **Av hesum er samsýning til leiðsluna:** | | |
| | Stjórn og stýrið | 1.250.242 | 1.249.203 |
| | Ársverk í miðal | 27 | 26 |

| 2 | MATERIELL STØÐISOGN | |
|---|---|---|
| | **Grundøki og bygningar** | |
| | Keypsvirði 1. januar | 37.804.363 |
| | Tilgongd í árinum | 1.217.786 |
| | Keypsvirði | 39.022.149 |
| | Av- og niðurskrivingar 1. januar | 3.535.769 |
| | Avskrivingar í árinum | 419.269 |
| | Av- og niðurskrivingar | 3.955.038 |
| | **Roknskaparligt virði 31. desember** | **35.067.111** |

| 3 | FÍGGJARLIG STØÐISOGN | |
|---|---|---|
| | **Onnur virðisbrøv** | |
| | Útveganarvirði 1. januar | 5.056.250 |
| | Frágongd í árinum | 0 |
| | Útveganarvirði | 5.056.250 |
| | Niður- og avskrivingar 1. januar | 0 |
| | Niður- og avskrivingar | 0 |
| | **Roknskaparligt virði 31. desember** | **5.056.250** |

| 4 | VIRÐISBRØV | 2022 kr. | 2021 kr. |
|---|---|---|---|
| | Lánsbrøv Føroya Landstýri | 2.974.506 | 6.580.961 |
| | Onnur virðisbrøv | 1.051.242.484 | 1.023.836.995 |
| | | **1.054.216.990** | **1.030.417.956** |

| 5 | EGINOGN | Stovnsfæ | Fluttur vinningur | Til samans |
|---|---|---|---|---|
| | Salda við ársbyrjan 1. januar 2021 | 93.840.006 | 988.319.263 | 1.082.159.269 |
| | Ársúrslit | 0 | 24.889.589 | 24.889.589 |
| | **Eginogn** | **93.840.006** | **1.013.208.852** | **1.107.048.858** |

**6 EVENTUALSKYLDUR V.M.**

Við árslok 2022 vóru 192 fólk, sum høvdu rætt til arbeiðsloysisstuðul. Um øll hesi verða fulltíðararbeiðsleys, til tey hava brúkt allar dagar, tey hava eftir við rætti til arbeiðsloysisstuðul, so verður samlaði kostnaðurin hjá ALS av hesum umleið 82,4 mió.kr. í 2023, 2024 og 2025.

**7 NÆRSTANDANDI PARTAR**

Føroya Landstýri velur stýrið í ALS.

ALS hevur avtalu við Trygdargrunn Fiskivinnunar og Fasta Gerðarætt um, at ALS hevur um hendi umsitingina av virkseminum hjá Trygdargrunni Fiskivinnunar og Fasta Gerðarætti.

sansir.fo

**ALS**
Tinghúsvegur 14

Tel 34 95 50
als@als.fo
www.als.fo